Formaður Javnaðarfloksins fegnast:

# Fólkaflokkurin lagt seg uppat Sjálvstýrislógini

**– At framstandandi fólkafloksmenn sum bæði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður og Anfinn Kallsberg, løgmaður nú leggja seg upp at Sjálvstýrislógini hjá Javnaðarflokkinum boðar frá góðum, og at tað er møguleiki at skipa fyri einum sterkum samarbeiði rundan um ein sjálvstýrispolitikk eftir valið**



*Jóannes Eidesgaard heldur, at Fólkaflokkurin hevur lagt seg á somu kós sum Javnaðarflokkurin í sjálvstýrismálinum*

SJÁLVSTÝRISTILGONGD
*Jan Müller*

– Uppskotið hjá Bjarna Djurholm um eina samveldisskipan millum Føroyar og Danmark er einki minni enn Sjálvstýrislógin, sum Javnaðarflokkurin hevur lagt fram. Hetta uppskot er nærum ein beinleiðis avskrift av Sjálvstýrislógini sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins í eini viðmerking til útmeldingina, sum landsstýrismaðurin hjá Fólkaflokkinum hevur spælt út við í fjølmiðlunum í vikuni.

– Fólkaflokkurin tosar her um eina samveldisskipan, meðan vit í Javnaðarflokkinum tosa um ein samveldissáttmála. Her er eingin munur. Talan er um eitt og sama mál.

Jóannes Eidesgaard sigur, at tað frøðir hann sum javnaðarmann at síggja, at framstandandi fólkafloksmaður tekur so heilt og fult undir við Sjálvstýrislógini hjá Javnaðarflokkinum. Hann er tað tann fyrsti uttan fyri Javnaðarflokkin, sum meldar so greitt út, at hann tekur undir við Sjálvstýrislógini.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at stórur partur av innihaldinum í uppskotinum hjá Bjarna Djurholm nemur við júst somu spurningar sum Sjálvstýrislógin. Eitt nú at Føroya Løgting er tann myndugleiki, sum skal gera av nær og hvørji mál man yvirtekur, og at tað so eru nøkur mál sum man er felags um.

– Sjálvstýrislógin byggir á, at tað er Føroya Løgting, sum er hægsti myndugleiki, og at tann myndugleikin ikki kann kallast aftur. Tað er tað, sum Nyrup nevndi fyri »uigenkaldelighed«. Tað er rættiliga prinsipielt fyri Javnaðarflokkin, at løgtingið ikki kann setast til síðis av nøkrum myndugleika. Og hetta er tað sama, sum Bjarni Djurholm nú nemur við.

Í uppskoti sínum nevnir Bjarni Djurholm eisini, at føroyingar skulu átaka sær ein nógv størri leiklut í uttanríkismálum.

– Tað hava vit eisini tikið hædd fyri í Sjálvstýrislógini, og er hetta eisini nakað, sum Nyrup gav til kennar í eini av sínum røðum, har hann segði, at føroyingar áttu at gera seg meira sjónligar á tí uttanríkispolitiska økinum sigur formaður Javnaðarfloksins og heldur fram:

– Til seinast sigur Bjarni Djurholm, at hesin sáttmálin skal fráboðast altjóða samfelagnum. Og tað júst tað sama, sum vit hava sagt: at hann skal staðfestast í eini fráboðan til ST, soleiðis at báðir til eina og hvørja tíð vilja virða hann. Hetta er nakað tað sama, sum bæði Nyrup og Fogh hava sagt.

Jóannes Eidesgaard er eisini sera feginn um viðmerkingarnar frá løgmanni í hesum máli: – Tá løgmaður tekur til orðanna og sigur, at tað Bjarni Djurholm skjýtur upp er í tráð við fólkaflokspolitikk, so dugi eg ikki at síggja munin. Tá hevur Fólkaflokkurin fullkomiliga lagt seg upp at Sjálvstýrislógini hjá Javnaðarflokkinum. Tað skuldi so boða frá, at tað er møguleiki fyri at skipa fyri einum sterkum samarbeiði rundan um ein sjálvstýrispolitikk eftir valið.

– At bæði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður og Anfinn Kallsberg, løgmaður nú kasta seg yvir Sjálvstýrislógina og konseptið hjá Javnaðarflokkinum boðar frá góðum, og tað sum onkur hevur kallað fyri grenj og jamran í fýra ár, hevur nú eftir øllum at døma borið frukt, tí aðrir nú ganga inn fyri tí sama, og sum er einasti møguleiki fyri at fáa eina breiða semju og sum hevur undirtøku í tí føroyska fólkinum.

Jóannes Eidesgaard heldur annars fyri, at tað, sum Javnaðarflokkurin mælir til í síni Sjálvstýrislóg, er munandi meira á sjálvstýrisleið enn tað, sum Tjóðveldisflokkurin heldur fast um, nevniliga Heimastýrislógina. – Hon hevur so hatta ivamálið um delegatiónina, og tað er nakað, sum Sjálvstýrislógin ruddar av vegnum, tí myndugleikin hjá løgtinginum ikki kann kallast aftur sigur Jóannes Eidesgaard og vísir her m.a. til, at vitjanin og útmeldingin frá Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra ikki leggur ein smástein fyri, at Sjálvstýrislógin kann gerast til veruleika.

– Tá tú nú heldur Sjálvstýrislógina verða so upplagda, hví hava tit tá ikki gjørt meira fyri at kunna fólk um innihaldið í hesi lóg?

– Tað er so ein kritikkur, sum vit mugu taka til okkum og gera nakað við. Vit hava helst verið alt ov upptiknir av at gera viðmerkingar til tað, sum landsstýrið er komið við heldur enn at vísa á okkara egna. Og tað er nettupp tað vit fara at brúka valstríðið til.

Rok í Suðurstreymoyar Javnaðarelag:

# Skulu finna nummar 11

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag skal á fundi næsta mikudag gera av, hvør skal eiga síðsta plássið á valevnalistanum, nú Katrin Gaard hevur tikið seg av. Sosialistiskt Ungmannafelag stillar eitt valevni upp, men enn er óvist, um hesin fær nakra mótstøðu**



*Bartal Nolsøe Poulsen fer at royna, um hann røkkur upp á listan hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymoy. Hann er umboð fyri Sosialistiskt Ungmannafelag*

*Mynd: Heri á Rógvi*

LØGTINGSVAL
*Heri á Rógvi*

Katrin Gaard hevur tikið seg av valevnalistanum hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymoy. Hon gjørdist annars nummar tvey av valevnunum á síðsta uppstillingarfundi, mikukvøldið 6. februar. Hóast tað var stór undirtøka fyri, at hon skuldi stilla upp, so hevur hon valt at taka seg av listanum. Sosialistiskt Ungmannafelag (SU) boðar í tíðindaskrivi frá, at felagið fleiri ferðir hevur heitt á Katrina um ikki at taka seg av listanum, men hon hevur tikið avgerð um ikki at stilla upp. Elsba Olsen, forkvinna fyri Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, sigur seg vera kunnað um avgerðina fyrst munnliga, síðani skrivliga. Elsba veit at siga, at Katrin Gaard hevur í hyggju at leita sær uttanlands í útbúgvingarørindum.

Elsba Olsen heldur avgerðina hjá Katrini vera óhepna.

–Tað er óheppið, at fólk taka seg av listanum, og tað er ikki gott fyri flokkin, sigur Elsba Olsen.

### Fundur mikukvøldið

Elsba Olsen og hini í nevndini í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag hava avgjørt at skipa fyri einum nýggjum uppstillingarfundi mikukvøldið, 20. februar. Á hesum fundinum verður atkvøtt um, hvør skal manna plássið, sum Katrin Gaard áður átti á valevnalistanum. Talan verður bert um tann eina fundin, har allir limirnir í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, ið vóru limir undan fyrsta uppstillingarfundi, ið var í desember, hava valrætt.

Tað er einki mark fyri, hvussu nógv kunnu stillast. Ei heldur er nøkur treyt, at nakar skal hava verið uppstillaður frammanundan til tað upprunaliga valevnavalið.

Katrin Gaard varð sjálv uppstillað av umboðum fyri SU, og tað hevur eisini verið siðvenja, at SU eigur eitt á valevnalistanum. Sosialistiskt Ungmannafelag boðar í tíðindaskrivi frá, at tey fara at stilla eitt valevni upp á fundinum mikukvøldið. Hetta verður Bartal Nolsøe Poulsen, sum áður hevur verið uppstillaður til fólkatingsvalið seinast.

–Tað varð heitt á meg um at stilla upp, og havi valt at takka ja til áheitanina, sigur Bartal Nolsøe Poulsen.

### Óbestemt

Gudmund Joensen, sum gjørdist akkurát ov stuttur at sleppa á listan við seinasta uppstillingarfund, hevur ikki avgjørt, um hann fer at stilla upp. Hann var seytjan atkvøður frá at kunna kalla seg valevni fyri Javnaðarflokkin í Suðurstreymoy.

–Eg havi ikki tikið nakra avgerð enn. Tað hevði kanska verið best, um tað varð onkur í tí yngra endanum, ið slapp upp á listan, sigur Gudmund Joensen.

Gudmund er búsitandi í Nólsoy, og hann veit at siga, at tað ikki bert er siðvenja at stilla umboð fyri SU upp, tí tað hevur eisini verið siðvenja, at eitt umboð úr Nólsoy endaði á valevnalistanum, men hetta er nú óvist.

Helena Dam á Neystabø hevur ikki verið at fingið fatur á.



# Tíðin hevur lekt sárini á Tvøroyri

**Alt gamalt agg er lagt til viks og javnaðarfólk, sum ikki hava kunnað verið í stovu saman, ganga nú hond i hond og hava bjóðað hvalbingum og sandvíkingum við**



*Fyrsta nevndin í samanlagda javnaðarfelagnum í Suðuroyar Norðaru helvt eru: Standandi f.v., Jens Johannesen av Tvøroyri,tiltakslimur, Manne Næs í Hvalba, Martin S. Eidesgaard av Tvøroyri, skrivari, Poul Olsen av Tvøroyri, tiltakslimur og Pauli Einarsson av Tvøroyri. Sitandi f.v. eru tær Solveig Bærentsen, av Tvøroyri, er kassameistari, Elisabeth Matras Olsen, av Tvøroyri, Ruth Midjord úr Hvalba,næstformaður og Kettu Andreasen av Tvøroyri, formaður*

SUÐUROY
*Áki Bertholdsen*

Sunnudagin boðaði javnaðarflokkurin fólki til fyrsta uppstillingarfund á Tvøroyri til løgtingsvalið.

Og hetta var ein søguligur fundur. Tí ímeðan tað í nógv ár hava verið trý javnaðarfeløg í suðuroyar norðaru helvt, eru tey nú løgd saman í eitt felag.

Serliga á Tvøroyri er hetta merkisvert, tí tað er ongin loyna, at har hava javnaðarfólk í nógv ár gingið í tveimum bólkum, sum hava verið heilt ósameiniligir.

Men eftir samanleggingina er alt gamalt agg lagt til viks og javnaðarfólk á Tvøroyri, sum í nógv ár ikki hava kunnað verið í stovu saman, ganga nú hond í hond

Samstundis er tað hent, at javnaðarfelagið í Hvalba eisini er komið uppí samanlagda felagið. Sostatt hava javnaðarfólk í allari norðaru helvt í Suðuroy savnað kreftirnar í einum og sama felag í Suðuroyar Norðara javnaðarfelag.

### Slitnaði í 1984

Í gomlum døgum var bara eitt javnaðarfelag á Tvøroyri og eitt í Hvalba.



*Eisini norðan av oynni vóru tey komin á fund. F.v. Niclas Sigurheim úr Sandvík, Trygvi Midjord og Eliesar Poulsen, báður úr Hvalba*

Men í áttatiárunum vaks ósemjan í millum ymsar javnaðarmenn í Tvøroyrar Býráð og tað endaði við, at háborg floksins fór í tvíningar.

Tað var fyrst og fremst ósemja ímillum býráðslimirnar hjá javnaðarflokkinum í býráðnum á Tvøroyri, sum bleiv so djúp, at at flokkurin á Tvøroyri fór í tvíningar.

Øll tey næstu árini gekk javnaðaflokkurin á Tvøroyri í tveimum, sum høvdu hvør síni valevni til býráð og Løgting.

Men hesi seinnu árini er kortini tiðnað so mikið ímillum partarnar, at til løgtingvalið í 1998, stillaðu bæði feløgini upp saman.

Og í fjør vóru endalig stig so tikin til at leggja bæði feløgini saman og tann samanleggingin varð veruleiki seinasta sunnudag. Tá kom eisini javnaðarfelagið í Hvalba upp í felagið og tey trý feløgini løgdu sostatt saman í eitt undir navninum Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag.

### Tíðin lekt sárini

Ketty Andreasen, formaður í nýggja, samanlagda felagnum, sigur, at ongin kann brúka eina ósemju til nakað og øll hesi seinastu árini, er tankin um at leggja saman búnaður so spakiliga.

– Tað, sum hevur størstan týdningin er, at vit øll í Suðuroyar Norðaru helvt standa saman í einum felag og nú ræður um at líta frameftir, tí tað er ongantíð ein fyrimunur at standa spjaddur, sigur hon.

Hon ásannar, at stríðið ímillum javnaðarfólk á Tvøroyri var rættiliga beiskt tað tíð, tað var.

– Men hesa ósemju hevur tíðarinnar tonn – og eitt nýtt ættarlið – brýnt so mikið, at øll eru samd um, at stundin nú var komin at grava stríðsøksina og at standa saman øksl við øksl, tí tað eru somu hugsjónir, vit hava, hóast vit ikki altíð hava somu meiningar um hvønn smálut.

### Óheppið signal

Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins, sigur, at síðani hann varð formaður floksins, hevur hann havt tað sum eitt av sínum aðalmálum at sameina javnaðarflokkin á Tvøroyri.

– Tað er eitt sera óheppið signal úteftir, at sjálv háborgin hjá javnaðarflokkinum ikki megnar at standa saman. Tí er hetta eitt mál, vit hava arbeitt við leingi og nú var stundin komin, har øll høvdu ásannað, at tíðin var búgvin til at leggja saman.

Annars heldur hann eisini, at tað hevur broytt støðuna, at yngri fólk eru komin framat.

– Nógv av teimum, sum eru virkin í dag, vóru óvitar, tá ið feløgini fóru sundur og tey høvdu trupult við at fáa eyga á ósemjuna. Tí eru allir partar nú samdir um, at tað er ongin orsøk til at halda lív í eini gamlari ósemju, sum í roynd og veru ikki er til longur, tí veruleikin er, at bæði feløgini á Tvøroyri hava samstarvað rættiliga væl og hava virkað sum eitt felag, men nú er endaliga stigið tikið.

Hann sigur, at javnaðarfelagið í Hvalba mundi vera eitt tað minsta lokalfelagið í landininum og tað vóru stórir trupulleikar at halda lív í felagnum. Tí søkti tað um at koma uppí felagið á Tvøroyri og tað varð so gjørt, so at øll feløgini tóku seg saman í eitt.

### Góðar vónir

Annars skiltist á uppstillingarfundinum, at tey hava góðar vónir til valið. Onkur meinti, at bóru tey seg klókt at, skuldi líkindi verið fyri at fingið trý umboð á ting fyri javnaðarflokkin í Suðuroy. Tað er hent fyrr, seinast í 1990, tá ið Jóannes Eidesgaard og Sverri Midjord av Tvøroyri og Henrik Old úr Vági, vórðu valdir á ting. Tá ið so Jóannes fór í Landsstýrið, kom Mikkjal Sørensen úr Porkeri á ting fyri hann.

Suðuroyar Norðara javnaðarfelag skal skjóta fýra valevni upp til endaliga valevnislistan og Suðuroyar Syðra javnaðarfelag, sum felagið í Vági nú eitur, skal skjóta hini trý valevnini upp.

Nøkur nøvn vórðu nevnd á uppstillingarfundinum sunnudagin og valla kann tað skaka nakran, at Jóannes Eidesgaard og Sverri Midjord vóru tvey av nøvnunum.

Somuleiðis var Eliesar Poulsen úr Hvalba nevndur, hann stillaði eisini upp seinast, men onnur nøvn vóru eisini, sum ikki hava verið so nógv frammi nú.

Seinni verður so ein uppstillingarfundur afturat, har uppskotini skulu endaliga viðgerast og at enda verður so ein uppstillingarfundur saman við Suðuroyar Syðra javnaðarfelag, har sjálvur tann endaligi valevnislistin til Løgtingið verður gjørdur.



*Frá vinstru eru tey Heri Mortensen, Helga Strøm og Daniel Jacob Smidt Jensen, øll trý gomul og vælkend javnaðarfólk á Tvøroyri.*

# Hava góðar vónir fyri javnaðinum í Suðuroy

SUÐUROY
*Áki Bertholdsen*

Javnaðarfólk í Suðuroy hava rættiliga góðar vónir til Løgtingsvalið, sum verður í apríl.

Sunnudagin hevði Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag sín fyrsta uppstillingarfund og har helt onkur, at tey skuldu seta nøsina upp eftir at fáa trý umboð á ting. Tey hildu, at bóru tey seg klókt at, skuldi líkindi verið fyri at fingið trý umboð á ting fyri javnaðarflokkin í Suðuroy. Tað er hent fyrr, seinast í 1990, tá ið Jóannes Eidesgaard og Sverri Midjord av Tvøroyri og Henrik Old úr Vági, vórðu valdir á ting. Tá ið so Jóannes fór í Landsstýrið, kom Mikkjal Sørensen úr Porkeri á ting fyri hann.

Tað ferðina kostaði tað tjóðveldismanninum sessin og fær javnaðarflokkurin aftur trý umboð á ting hesuferð, er tað eisini sannlíkt, tað verður aftur tjóðveldismaðurin, sum fer at liggja eftir á.

Suðuroyar Norðara javnaðarfelag skal skjóta fýra valevni upp til endaliga valevnislistan og Suðuroyar Syðra javnaðarfelag, sum felagið í Vági nú eitur, skal skjóta hini trý valevnini upp.

Nøkur nøvn vórðu nevnd á uppstillingarfundinum sunnudagin og valla kann tað skaka nakran, at Jóannes Eidesgaard veteranurin, Sverri Midjord, vóru tvey av nøvnunum.

Somuleiðis var Eliesar Poulsen úr Hvalba nevndur, hann stillaði eisini upp seinast, men onnur nøvn vóru eisini, sum ikki hava verið so nógv frammi nú.

Seinni verður so ein uppstillingarfundur afturat í Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag, har uppskotini skulu endaliga viðgerast.

Og at enda verður so ein endaligur uppstillingarfundur saman við Suðuroyar Syðra javnaðarfelag, har sjálvur tann endaligi valevnislistin til Løgtingið verður gjørdur liðugur.